


**ES-grundlóg:** Ein komandi samanstoytur kann vera á veg millum ES-grundlógina og ríkisfelagsskapin, har grundleggjandi fólkaræðisligu rættindi okkara eru í vanda. Tí er spurningurin, um føroyingar og grønlendingar - sum eru danskir borgarar, men ikki ES-borgarar - ikki skuldu havt rættindini at luttikið í eini komandi avgerð um ES-grundlógina

# ES-grundlógin í stríð við ríkisfelagsskapin

VIÐMERKING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*


*Hóast danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen gav í røðu á Cristiansborg lyfti um, at føroyingar skulu takast við uppá ráð í teimum ES-viðurskiftum, sum ávirka okkum, hevur lítið higartil verið at sæð til hetta, hóast ES-grundlógin helst verður samtykt longu næsta vikuskiftið*

Eftir parlamentsvalið sunnudagin 13. juni verður ES-toppfundur 17.-18. juni, og tá skal fyrsta uppskotið til ES-grundlógina eftir ætlan samtykkjast. ES-limalondini komu til eina semju hesum viðvíkjandi í seinnu helvt av 2003 eftir intensar samráðingar, og semjan um ES-grundlógina er úrslit av einum arbeiði, sum fór í gongd eftir samtyktina av NICE-sáttmálanum afturi í 2001. Semjan fyri ES-grundlógini er ein varði í gongdini og kjakinum um europeisku framtíðina.

Longu nú tykist semja vera um innihaldið í uppskotinum til nýggju grundlógina, og greitt er, at fleiri øki í ríkisfelagsskapinum millum Grønland, Føroyar og Danmark helst eisini verða ávirkað av ES-grundlógini.

Tí skuldi kravið einfalt verið, at føroyskir og grønlendskir íbúgvar eisini skuldu havt møguleikan at luttikið í eini komandi avgerð um ES-grundlógina. Men einki røkist fyri hesum, og danska stjórnin hevur als ikki tikið føroysku stjórnina við í viðgerðina og samráðingarnar um ES-grundlógina, hóast danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen gav lyfti um hetta í røðu í Fólkatinginum á sinni. Hinvegin hevur Føroya Landsstýri eftir øllum at døma eingi stig tikið til at vera við í hesi gongdini. Undanfarna fullveldissamgongan hevur ikki verið partur av nøkrum arbeiði fram ímóti eini grundlóg, og tað hevur núverandi samgongan heldur ikki, hóast løgmaður hevur luttikið í fakligum kjakið á Christiansborg.

Hesi vantandi initiativ skyldast helst, at vit ikki eru partur av ES, men nú ES-grundlógin møguliga fær stóra ávirkan á ríkisfelagsskapin, skuldu føroyingar luttikið í gongdini. Men einki hevur verið at sæð til hetta. Ein skelkandi líkasæla, hóast ES-grundlógin kann fáa stórar avleiðingar fyri Føroyar og Grønland.

Um norðuratlantisku stjórnirnar og veljararnir ikki fáa loyvi at luttaka í og gera sína ávirkan galdandi viðvíkjandi ES-grundlógini og møguligum avleiðingum, er vandi fyri, at vit missa grundleggjandi fólkaræðislig rættindi.

## Samanstoytir

Truplu spurningarnir viðvíkjandi ES-grundlógini og ríkisfelagsskapinum eru fyrst og fremst at finna í teimum felagsmálum í ríkisfelagsskapinum, sum Danmark umsitir vegna Føroyar og Grønland, men sum sambært nýggju ES-grundlógini gerast ES-mál í framtíðini og tá umsitin úr Brüxelles. Sostatt verða føroysk og grønlendsk øki møguliga umsitin úr ES, uttan at vit føroyingar hava valt hetta.

Í løtuni eru grundleggjandi súlurnar í ríkisfelagsskapinum ein felags grundlóg, felags statsborgaraskapur, felags uttanríkis- og trygdarpolitikkur, felags rættarpolitikkur, felags gjaldoyra og umframt hetta felags politikkur á fleiri øðrum økjum. Sambært grundlógini kunnu hesi felagsmálini í ríkisfelagsskapinum bert broytast eftir paragraff 88 í grundlógini um grundlógarbroytingar, og tað krevur luttøku frá fólkinum, eisini føroyingum og grønlendingum.

Men ES-grundlógin kann kollvelta øll hesi øki í ríkisfelagsskapinum, uttan at føroyingar og grønlendingar hava ávirkan, og hetta er sostatt í grundleggjandi stríði við grundlógina, sum er hornasteinurin í ríkinum. Føroyingar hava fyrr ikki luttikið í ES-fólkaatkvøðum, tí Føroyar ikki hava verið limir í ES, og hesin logikkur hevur bygt á, at tað er høpisleyst, at føroyingar skulu hava ávirkan á nakað, teir ikki eru partur av.

Hesar grundgevingar hava higartil verið rímiligar, men kanska ikki longur. Seinastu árini hevur ES við stórari success ment seg, og við nýggju grundlógini fer ES møguliga nú at ávirka fleiri øki og mál í sjálvum ríkisfelagsskapinum. Við øðrum orðum er støðan nú, at ES-grundlógin - uttan at vit velja tað - eisini kann koma at fevna um Føroyar og Grønland í ávísan mun. Tí skuldu norðuratlantisku tjóðirnar eisini havt sína ávirkan.

## Felagsmál til Brüxelles

Higartil hava felagsmálini í ríkisfelagsskapinum uttanríkismál, gjaldoyramál, verjumál og rættarmál ikki verið ES-mál, og hetta hevur forðað fyri einum veruligum, týðiligum og sjónligum samanstoyti millum ES og ríkisfelagsskapin. Men nú kann sannleikans tími vera komin við eini uppgerð fyri framman, tí við eini komandi ES-grundlóg verða hesi áðurnevndu felagsmál helst eisini undirløgd ES, og so er ikki torført at fáa eyga á ógreiðu spurningarnar, sum taka seg upp fyri Føroyar og Grønland. Sostatt kann ES-grundlógin koma í stríð við núverandi bygnaðin og skipanina í ríkisfelagsskapinum.

ES-grundlógin sigur eisini, at ES-dómstólurin hevur myndugleikan yvir nationalu rættarskipanunum í ES-limalondunum, og tað merkir, at danska grundlógin og danski statsrætturin eisini eru undirløgd ES-rættin. Og tá danska rættarskipanin eisini umfatar føroysku og grønlendsku rættarskipanina, kunnu vit eisini á hesum øki verða automatiskt undirløgd ES-rættin.

Føroyska stjórnin hevur sum skilst eisini í umbúna at fáa størri ávirkan á uttanríkispolitiska økið, men samtyktin í ES-grundlógini hesum viðvíkjandi er, at uttanríkis- og verjupolitiska ES-samstarvið gerst tættari og meiri integrerað enn nakrantíð áður. 2003 varð eyðkent av einum felags ES-uttanríkispolitikki við hernaðarluttøku á t.d. Balkan, í Miðeystri og í Afrika. Umframt hetta hevur ES stungið út í kortið eina langsiktaða felags hernaðarætlan, sum Danmark aktivt hevur luttikið í. Sostatt røkist fyri, at danski og harvið okkara uttanríkispolitikkur heilt gerst partur av ES.

Umframt uttanríkis- og rættarmál eru gjaldoyramál eisini viðkomandi. Undan fólkaatkvøðuni í Danmark í 2000 um felags evruna segði danska Uttanríkisráðið í sambandi við Føroyar og Grønland, at "Dette spørgsmål skal vi selv tage stilling til. Der er tale om et rigsanliggende". Við hesum setningi tykist tað, sum avgerðin um føroyskt og grønlendskt gjaldoyra skal takast í Danmark.

## Ógreið føroysk luttøka

Um ynskið verður sett fram um luttøku í avgerðini um ES-grundlógina, taka enn fleiri truplir spurningar seg upp. Fyrst og fremst er spurningurin, um vit skulu hava eina innanhýsis fólkaatkvøðu í ríkinum. Hvat skulu vit føroyingar atkvøða um ella vera við at avgera? Við øðrum orðum, hvat skal standa á einum eventuellum atkvøðuseðli? Skulu føroyingar og danir atkvøða fyri tí sama? Skulu allar atkvøðurnar í ríkinum teljast upp saman, ella skal hvørt landið sær koma fram til sítt tjóðarynski? Hvat skulu vit í grundini taka støðu til?

Um føroyingar fáa loyvi til og taka stig til at ávirka framtíðaravleiðingarnar fyri eini ES-grundlóg, eru allir hesir áðurnevndu spurningar framvegis ógreiðir og als ikki viðgjørdir í Føroyum. Báðir mótstøðumenninir í ES-høpi Kaj Leo Johannesen og Høgni Hoydal hava alment borið fram, at føroya fólk skulu sleppa til orðanna, um ES-grundlógin ella ES-menningin beinleiðis fer at ávirka Føroyar, men enn er einki kjak og eingin viðgerð fingin í lag her á landi, og tískil er føroyska tjóðin ófyrireikað til tær uppgávur, sum møguliga liggja fyri framman, nú ES-grundlógin eftir ætlan skal samtykkjast næsta vikuskiftið. Tí er í tøkum tíma, at kjak fæst í lag um grundleggjandi fólkaræðisligu rættindi okkara.

## Brot á mannarættindi

Við støði í øllum hesum ósvaraðu spurningunum og trupulleikunum tykist tað ikki vera rætt, at føroyingar ikki skulu ávirka ES viðurskifti, tí Føroyar ikki eru limir í ES. Sum partur av ríkinum eru vit tvørturímóti óbeinleiðis eisini partur av ES, tí Danmark er limaland og umsitir føroysk mál, og tí skuldu vit kravt ein ávirkandi leiklut í ES-avgerðunum.

Um ikki er talan um ein ódemokratiskan og diskrimerandi framferðarhátt frá donsku stjórnini, samstundis sum føroyska tjóðin eisini sjálv hevur skuldina og sett seg í hesa støðu við vantandi initiativum.

Við støði í ambitiónunum hjá ES eru tí orsøkir at vænta ein harðan samanbrest millum ES-grundlógina og ríkisfelagsskapin, og tí hevur tað stóran týdning, at so leingi ríkisfelagsskapurin eksisterar, skulu øll lond í ríkinum sleppa til orðanna um ES-grundlógina.

Um nakar politiskur myndugleiki í ríkisfelagsskapinum forðar fyri hesum, er talan ikki bert um brot á grundleggjandi fólkaræðislig mannarættindi, men eisini ólógligt sambært grundlógini og europeiska mannarættindasáttmálanum. Umframt hetta bendir nógv á, at ES-grundlógin als ikki kann takast í nýtslu, uttan at talan verður um brot á paragraff 88 í grundlógini, ella um sama paragraff verður broytt. Og tá mugu vit umdefinera ríkisfelagsskapin.

Tí verður staðiliga heitt á politisku myndugleikarnar at stuðla kravinum um, at allir veljarar í ríkinum skulu sleppa til orðanna um ES-grundlógina ella møguligar avleiðingar, eisini í Føroyum og Grønlandi. Hetta eigur at vera politiska og rættarliga minimumkravið.

*Keldur:*

*"EU-grundlov på kollisionskurs med rigsfællesskabet", Ole Krarup og Lave K. Boch, Kristeligt Dagblad, mai 2004*

*"EU 2003 beretning", danska Uttanríkisráðið, mai 2004*

*"På arbejde for Danmark", danska Uttanríkisráðið, mai 2004*

*"Et frit Norden", Ole Krarup, mai 2004*

*"Europa hvorhen?", Ole Krarup, 2004*

*Danmark Radio*

# Ríkisfelagsskapurin møguliga endurskoðast


*-Tað er ógvuliga umráðandi at hava í geyma, at sjálv ES-grundlógin er eitt mál hjá dønum at taka støðu til. Tað er ikki ES-grundlógin sjálv, sum er áhugaverd fyri føroyingar, men avleiðingarnar av henni, sigur, Jóannes Eidesgaard, løgmaður.*

*Mynd: Savnsmynd*

**Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, ásannar, at ES-grundlógin kann fáa stórar avleiðingar fyri ríkisfelagskapin.**

ES-GRUNDLÓGIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Verður uppskotið til ES-grundlógina samtykt? Hvørjar broytingar verða framdar í núverandi uppskoti? Fara danir at atkvøða fyri grundlógini? Hvussu verður við teimum fýra donsku fyrivarnunum (gjaldoyramál, verjumál, rættarmál og ES-borgararætt, blðm)?

Hesar spurningar setir løgmaður sær á skrivstovuni í Tinganesi í hesum døgum.

Í komandi viku verður ES-toppfundur, og tá skal fyrsta uppskotið til ES-grundlógina eftir ætlan samtykkjast. Verður ES-grundlógin endaliga samtykt, fær tað helst stóra ávirkan á fleiri øki í ríkisfelagsskapinum millum Grønland, Føroyar og Danmark.

Taka danir undir við ES-grundlógini, skal ES í framtíðini umsita uttanríkismál, verjumál, gjaldoyramál og rættarmál fyri danir. Hesi mál verða bólkað sum felagsmál í Heimastýrislógini, og stóri spurningurin er, hvørja støðu føroyingar og grønlendingar koma í, um ES-grundlógin verður samtykt.

Hvørki Grønland ella Føroyar eru limir í ES, men kortini kann ein samtykt ES-grundlóg fáa stórar avleiðingar fyri ríkisfelagsskapin millum Grønland, Danmark og Føroyar.

## Nógvar óvissur

– Tað eru avleiðingarnar av ES-grundlógini, sum eru mest áhugaverdar fyri okkum. Vit eiga at lýsa støðuna og kanna, hvussu ES-grundlógin kann koma at ávirka okkara støðu í ríkisfelagskapinum, greiðir løgmaður frá.

Løgmaður sigur, at hann ætlar at taka málið um ES-grundlógina upp á ríkisfundinum millum stjórnarleiðararnar úr Danmark, Grønlandi og Føroyum í august mánaði í Grønlandi.

Aðrastaðni á síðuni verður funnist at donsku og føroysku stjórnarflokkunum fyri vantandi samskifti í samband við fyrireikingarnar til ES-grundlógina.

Í komandi viku verður avgerð tikin um ES-grundlógina. Áttu danir og føroyingar ikki at raðfest málið hægri, tá endaliga samtyktin kann fáa álvarsamar avleiðingar fyri ríkisfelagskapin?

Jú, tað áttu vit kanska, men eg haldi ikki tað er ein ólukka, at vit ikki taka málið upp fyrr enn í august. Ein stórur trupulleiki í løtuni er, at eingin veit, hvør endaliga avgerðin verður í ES. Hvørjar verða broytingarnar? Fara stjórnarleiðararnir at finna eina semju? Fara danir at atkvøða fyri? Hvussu verður við teimum fýra fyrivarnunum? Tað eru ómetaliga nógvar óvissur í sambandi við grundlógina, og tað er avgjørt ein orsøk til, at vit ikki hava tosað nærri saman, sigur Jóannes Eidesgaard.

Løgmaður heldur, at tað er skilagott at seta fólk at kanna, hvørjar avleiðingar ES-grundlógin fær fyri ríkisfelagsskapin, men leggur enn einaferð afturat, at mongu óvissurnar í samband við ES-grundlógina ger málið torført at kanna, tí tað er so óítøkiligt.

– Tað er ógvuliga umráðandi at hava í geyma, at sjálv ES-grundlógin er eitt mál hjá dønum at taka støðu til. Tað er ikki ES-grundlógin sjálv, sum er áhugaverd fyri føroyingar, men avleiðingarnar av henni, vísir løgmaður á.

## Umskipa ríkisfelagskapin

Spurdur, hvørjar avleiðingar løgmaður væntar ein samtykt ES-grundlóg fær fyri ríkisfelagsskapin, svarar Jóannes Eidesgaard, at tað kann fáa stórar avleiðingar.

– Taka danir undir við ES-grundlógini, verða millum annað uttanríkis- og verjumál flutt til Brússel. Hetta fer helst at hava við sær, at ríkisfelagskapurin má endurskoðast, tí ES-grundlógin broytir ríkisfelagskapin grundleggjandi. Hvussu ríkisfelagskapurin kann endurskoðast er kortini ein opin spurningur, greiðir Jóannes Eidesgaard frá.